# Keypstreytir til talgilda undirskrift við Samleikanum

Talgild undirskrift við Samleikanum er loysn frá Gjaldstovuni og hevur sama rættarvirknað sum handskrivað undirskrift, sbrt. løgtingslóg um talgildan samleika.

Treytirnar fyri at keypa talgilda undirskrift við Samleikanum á Vanganum eru lýstar niðanfyri. Við at halda áfram við keypinum, góðkennir tú samstundis hesar keypstreytir.

## Tín ábyrgd

Tú mást vera myndigur fyri at tín undirskrift skal vera løgfrøðiliga bindandi.

Tað er tín ábyrgd at tryggja, at alt innihald í skjølunum, ið tú undirskrivar við Samleikanum eru lóglig.

Gjaldstovan hevur ikki atgongd til innihaldið í skjølunum.

Gjaldstovan goymir ikki eintøk av undirskrivaðum skjølunum, og hevur tískil ongan møguleika at endurskapa skjøl, t.d. í sambandi við møguligt trætumál. Tað er tískil tín uppgáva at tryggja, at skjøl eru goymd á tryggum stað.

Tað kunnu vera formkrøv til eina undirskrift ella eitt skjal ísv. avísa tænastu, t.d. at eitt skjal skal innihalda handskrivaða undirskrift. Tú hevur ábyrgdina at tryggja formkrøv, har tú brúkar talgilda undirskrift við Samleikanum.

## Viðgerð av persónsupplýsingum

Kunning um viðgerð av persónsupplýsingum í samband við undirskrift við Samleikanum kann lesast her: https://repository.samleiki.fo/

## Iðranarrættur

Við at góðkenna hesar keypstreytir  samtykkir tú samstundis, at tú fráskrivar tær rættin til at angra hetta keypið.

## Endurgjald

Gjaldstovan og undirveitarar hjá Gjaldstovuni hava ikki endurgjaldsskyldu mótvegis tær fyri:

- tap, har atvoldin er hending/transaktión knýtt til eina talgilda undirskrift við Samleikanum á Vanganum
- feilir ella seinkanir, ið Gjaldstovan ella undirveitarar hjá Gjaldstovuni, ikki við rímiligheit kunnu ábyrgdast fyri, undir hesum, men ikki avmarkað til, denial-of-service attacks, vánaligt internet samband, linju seinkanir, streymslit ella maskinfeilir

Gjaldstovan kann ikki ábyrgdast fyri óbeinleiðis tap hjá tær ísv. keyp av talgilda undirskrift á Vanganum